NSÍ-HB 0-2 (0-1):

# Bara HB hevði málmøguleikar

**Hóast teir í 1. hálvleiki vóru sera ágangandi, so megnaðu NSÍ menninir ongantíð at spæla seg til uppløgdu málmøguleikarnar, sum HB gjørdi og fekk úrtøku burturúr**



HB viðhaldsfólkini tustu inn á vøllin, tá dysturin í Runavík var av, og gleðin var skillig. Gaman í resta enn tríggir dystir, men sigurin sunnudagin var í øllum førum eitt risa-fet móti FM-heitinum

Mynd: Álvur Haraldsen

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Tey fleiri hundrað reyð og svartkløddu HB viðhaldsfólkini fóru í góðveðrinum sunnudagin í sera góðum hýri úr Runavík. Tað høvdu tey alla orsøk til. Teirra lið hevði vunnið 2–0, og harvið hevði HB so rudduliga sagt takk fyri seinast. Tað var stórt vónbrot hjá HB, tá NSÍ á ólavsøku fór avstað við løgmanssteypinum fyri eygunum á teimum. Liðið fór í leikligan aldudal, úrslitini vóru ikki góð, og leiðslan í felagnum metti støðuna so álvarssama, at venjarin varð skiftur út.

HB sigurin í Runavík var á onganhátt óuppiborin. HB hevði víst best skipaða fótbóltsspælið, og tað vóru bara teir, sum høvdu spælt seg til upplagdar møguleikar. Nocko Jocovic skoraði tvey mál. Tað fyrra kom stutt undan hvíldini, og longu tá bendi nógv á, at tað fór at verða torført hjá heimaliðnum at venda gongdini.

Málmøguleikar og royndir ímóti málinum skulu til, um fótbóltsdystir skulu vinnast. NSÍ megnaði ongantíð at spæla seg til møguleikar, og so fingu teir einki mál. Ulrik Balling var skaddur, og Sonni L. Petersen var leikbannaður. Tað var ein partur av frágreiðingini, hví NSÍ ikki hevði tyngdina í framrættaða spælinum, sum teir næstan hvørja ferð hava víst fyrr í ár.

Heimaliðið legði fyri sum eitt ódnarveður. Teir vóru nøkur prosent ágrýtnari enn gestirnir. Tað hevði við sær, at tað mesta í fyrra umfarinum gekk fyri seg eftir treytunum hjá NSÍ. Teir høvdu bóltin meiri, teir vunnu fleiri nærdystir enn mótstøðumenninir, og tað var týðuligt, at HB menninir ofta kendu seg kroystar. Jan C. Dam var allar 90 minuttirnar sera skilagóður stýrimaður, men verjan sparkaði ofta høgt og langt og skeivt, og tað kom sera sjáldan fyri í fyrra umfarinum, at fremstu menninir fingu líkinda bóltar at arbeiða við.

Men hóast teir tóktust vera omaná, so megnaði NSÍ ongantíð at hótta HB málið. Burtursæð frá onkrum hornaspørkum og hissini afturleggingum var Bárður Johannesen arbeiðsleysur. Fyrsta skotroyndin hjá NSÍ var í 39. minutti, tá Óli Hansen úr átjan metrum sendi við síðuna av. Sjúrður Jacobsen og Jónstein Petersen royndu í vinstru, og Gert Langgaard og Brynjolvur Nielsen í høgru, men tað gjørdist ongantíð vandamikið. Hugflogið var ikki nóg stórt, og síðstu sendingarnar til fremstu menninar vóru so mikið óneyvar, at tað skuldi nógv tíð til at temja, og so var tað lætt hjá HB verjuni.

### Lagnuløtan

Tað vóru nógvir nærdystir, og eingin spardi seg. Kortini var uppgávan ongantíð torfør hjá dómaranum.

Tá fyrra umfarið var um at vera liðugt, fór hann í lumman eftir gula kortinum. Eftir kiks í NSÍ uppspælinum sá Pól Thorsteinsson seg noyddan at fella Andrew av Fløtum eitt sindur frammanfyri miðstrikuna, men tað tóktist ikki sum nakar vandi var á ferð.

Rúni Nolsøe sendi frísparkið ímóti NSÍ brotsteiginum, men tað tóktist eitt sindur ullint. Kortini fekk NSÍ verjan ikki tak á. Mitt fyri málinum og seytjan metrar úti møtti Andrew av Fløtum bóltinum. Við hælinum potaði hann inn um verjuna, og Nocko Jokovic brendi tonna undir bóltin, sum snýkti sær inn við stólparótini. Tað tóktist sum um Jens Martin Knudsen metti bóltin at vera hinumegin stólpan.

HB fagnaðurin var stórur, og tað var ikki undarligt. Teir høvdu fyri tað mesta verið undir. Tað hevði verið langt millum fremstu menninar hjá teimum og teir, sum skuldu stuðla. Men nú bilti tað ikki. Teir høvdu havt einasta møguleikan í fyrra umfarinum, teir vóru frammanfyri 1–0, og støðan legði upp til, at seinna umfarið skuldi ganga fyri seg upp á teirra treytir.

### Betri fótbóltsspæl

Eftir steðgin megnaði NSÍ ikki at halda sama trýstið á mótstøðumonnunum, sum teir høvdu havt í fyrra umfarinum. Ferðin fór eitt vet niður, og so fekk HB fatur á endanum. Nicu Dogaru, Rúni Nolsøe og Rógvi Jacobsen fingu fatur á fótbóltsspælinum, Jón Rói Jacobsen og Andrew av Fløtum vóru – ofta í so langt – afturi á vøllinum og hjálptu til, og HB vann næstu bóltarnar. Nocko Jokovic fekk sendingar, sum hann við høvdinum legði í borðini, men har var ikki ofta hjálp at fáa.

NSÍ sendi fólkið alt longri fram á vøllin, og hóast teir ikki spældu seg til málmøguleikar, so varð intensiteturin varðveittur, tí teir høvdu fleiri hornaspørk og okkurt frísparkið. Hóast hann arbeiddi nógv, so sást tað, at Helgi L. Petersen ikki var so væl fyri eftir skaðasteðgin, sum hann var á ólavsøku, Óli Hansen hevði onga roynd ímóti málinum, og fram ímóti dystarenda var dómarin ikki samdur við teimum, tá teir vildu hava brotsspark, tá innskifti Djóni N. Joensen var farin um koll.

Í hinum endanum var Andrew av Fløtum tvær ferðir um at avgera. Í fyrra snarálopinum sendi hann úr 16 metrum og í beinið á Jens Martini, og í seinna førinum var hann óheppin, tá hann eftir fínt uppspæl og innlegg úr høgru við handara stólpan lyfti bóltin uppum málverjan, men bólturin brast í tvørtræið.

Jóhannis Joensen var eisini um reppið at fáa mál, tá hann hevði sníkt seg fram, og so var tað, at HB slerdi sigurin fastan. Teir fangaðu NSÍ í uppspæli á HB helvtini, Jón Rói spældi eitt tvey við Nocko, tuskaði frá verjuni, og tá hann var komin langt inn í brotsteigin í høgru, sendi hann bóltin framvið Jens Martini, og Nocko Jockovic hevði púra opið mál fyri sær.

Teir gulu og svørtu kunnu gleðast um steypasigurin á ólavsøku. Svørtu og reyðu fløggini boðaðu sunnudagin frá, at vánirnar hjá NSÍ at vinna FM eru sera kámar í løtuni. Nú er tað HB, sum hevur fatur á rætta endanum.

### Dysturin í tølum

NSÍ-HB 0-2 (0-1)
0-1: Nocko Jokovic 44
0-2: Nocko Jokovic 88
Dómari: Lassin Isaksen

NSÍ: Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Arnfinn Langgaard, Pól Thorsteinsson, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard, Ian Højgaard, Kári Hansen, Jónstein Petersen – Helgi L. Petersen, Óli Hansen
HB: Bárður Johannesen – Hans á Lag, Jóhannis Joensen, Jan C. Dam, Janus M. Joensen – Nicu Dogaru, Rúni Nolsøe, Rógvi Jacobsen, Jón Rói Jacobsen, Nocko Jockovic, Andrew av Fløtum





*Tað nógva av spælinum gekk fyri seg á miðvøllinum. Her eru tað Nicu Dogaru og Ian Højgaard, sum dystast um bóltin*

Mynd: Álvur Haraldsen

NSÍ venjarin:

## Nú verður HB meistari

**Jógvan Martin Olsen ásannar, at hansara lið ikki spældi upp til sítt besta ímóti HB, sum hevði fleiri streingir at spæla uppá**



*– Eg havi alla virðing fyri EB/Streymi, Skála og TB, men tað er einki, sum bendir á, at nakað av hesum liðunum fer at gera nakað við HB, helt NSÍ venjarin eftir dystin*

Mynd: Álvur Haraldsen

NSÍ–HB
*Jóannes Hansen*

Jógvan Martin Olsen og hansara menn hava seinastu vikurnar verið ovast á støðutalvuni. Tað eru teir ikki eftir fimtanda umfarið. 2–0 tapið ímóti HB ber við sær, at NSÍ er á triðja plássinum. HB hevur bestu kortini á hondini, og NSÍ venjarin sigur seg ikki duga at ímynda sær, at HB fer at sleppa takinum.

– Eg havi alla virðing fyri EB/Streymi, Skála og TB, men tað er einki, sum bendir á, at nakað av hesum liðunum fer at gera nakað við HB. Vit mugu ásanna, at tá tað ráddi mest um, vóru vit ikki nóg sannførandi, staðfestir NSÍ venjarin.

*Tað var ein dyggur smeitur, at tit ikki høvdu Ulrik Balling og Sonna L. Petersen við?*

– Avgjørt. Tað var sera harmuligt, men soleiðis eru treytirnar. Okkara royndu at gera teirra besta, men vit mugu bara staðfesta, at spælið var ikki tað, sum vit hava víst í nógvum av hinum dystunum.

*Nær vart tú greiður yvir, at tað ikki fór at eydnast tykkum í hvussu so er at røkka javnleikinum, sum hevði verið so týdningarmikil?*

– Vit høvdu gott trýst á teimum í 1. hálvleiki, men vit megnaðu ikki at spæla okkum til upplagdar møguleikar. Fyrra málið hjá teimum eiga teir ikki at sleppa at skora. Í steðginum avráddu vit at halda fram, sum vit høvdu gjørt og so at leggja alt meiri í álopspartin. Tá Ulrik Balling og Sonni L. Petersen vóru burturfrá, kom tað illa við, at Kári Hansen noyddist av vøllinum. Hann vandi ikki í vikuni. Hann var førur fyri at spæla, men sjálvandi var tað ikki optimalt, tá hann ikki var við í fyrireikingunum, sum hinir vóru tað.

*Og hvat sigur tú um HB liðið?*

– Serliga í 2. hálvleiki sást , at teir høvdu fleiri streingir at spæla uppá, enn vit høvdu. Teir fingu fatur á fótbóltsspælinum, og teir vunnu nærdystirnar. Vit trúðu alla tíðina uppá, at tað kanska fór at eydnast í deyðbóltsstøðu at skora mál og harvið at fáa javnleik, men tað gjørdi tað ikki.

## Nocko gevur kollektivinum æruna

**Jóannes Jakobsen var sera væl nøgdur við, at HB endiliga hevði víst, at teir aftur eru førir fyri at koma væl frá týdningarmiklastu dystunum**



*Tvífaldi málskjúttin, Nocko Jokovic, var sjálvsagt fegin um sigurin, men heldur enn at taka æruna sjálvur, valdi hann at býta hana við viðleikararnar*

Mynd: Álvur Haraldsen

NSÍ–HB
*Jóannes Hansen*

Eingin ivi er í, at HB hevur verið djúpt í lummanum, tá teir fyrr í summar skrivaðu undir avtalu við Nocko Jockovic. Sunnudagin varð staðfest í Runavík, at íløgan í danska álopsspælaran hevur loyst seg. Nocko Jockovic skoraði bæði HB málini, og harvið sparkaði hann HB nærri FM heitinum og milliónini, sum teir síðani 1998 hava longst eftir at endurvinna.

Fremmandi álopsmaðurin fekk ikki so nógvan stuðul, sum HB liðið vanliga veitir fremstu monnunum. Men hann var støðugt við í spælinum, og hann skoraði tey bæði málini, sum bóru HB so nógv nærri móti meistaraheitinum.

Málskjúttin var sjálvandi ovurfegin, men hann vildi ikki hava, at tað snúði seg um hann:

– Talan var um kollektivt avrik. Um tað var eg ella onkur annar, sum skoraði málini, hevur ikki so nógv at siga. Í fyrra førinum var talan um geniala fríspæling frá Andrew av Fløtum, sum eg fekk uttaru síðu á fótinum undir, og í seinna førinum var málið púra opið, tá Jón Rói Jacobsen – eftir at hava runnið tredivu metrar – trillaði bóltin fyri føturnar á mær.

*Var sigurin uppiborin?*

– Fótbóltur snýr seg um at spæla seg til møguleikar og at skjóta mál, og tað vóru vit betri til enn mótstøðumenninir, segði Nocko Jockovic við Útvarp Føroya eftir dystarenda.

Jóannes Jakobsen, sum saman við Kári Nielsen hevur ábyrgdina av HB liðnum, var eisini væl nøgdur:

– Verjuspælið var sera gott hjá okkum. Framrættaða spælið var ikki so gott, sum tað kann vera, men tað ráddi um úrslitið, og tað kunnu vit ikki vera annað enn nøgdir við. Vit høvdu ikki nógvar stórar møguleikar, men vit skoraðu málini.

*Tit vardu nógv í 2. hálvleiki?*

– Tað var ikki ætlanin, at liðið skuldi liggja so aftarlaga. Vit áttu at havt verið einar tíggju til fimtan metrar longri frammi. Fjarstøðan til teir á toppinum gjørdist ov stór, og tað gekk út yvir álopsspælið. Men alt í alt kunnu vit ikki vera annað enn nøgdir.

*Nú liggur leiðin til FM heitið opin?*

– HB hevur gott fólk, og tað var týdningarmikið, at HB aftur megnaði at vinna lykladyst. Vit ætla at vinna hvørja ferð, og um tað eydnast, so fer at síggja ljóst út. Hetta var forloysingin, segði væl nøgdi Jóannes Jakobsen við Útvarp Føroya.